## Ingolfsfjall skalv

Fólk, sum búgva á leiðini við Ingolfsfjall og í bygdini Selfossi á Suðurlandinum í Íslandi, fingu ein skelk um middagsleitið í gjár, tá jørðin fór at skelva undir teimum. Skjálvtin var bara 2,7 á Richter-stiganum, og tveir minuttir seinni var ein, sum var 2,3 á Richter-stiganum. Skjálvtarnir komu tó ikki heilt óvart á fólk, tí nakrir smærri skjálvtar vóru gjáranáttina. Sambært jarðfrøðingunum var miðdepilin í skjálvtunum ein kilometur undir jørð.



## Vikuskiftismøti í Oasuni

Byrjað verður fríggjakvøldið við bønarmøti kl 21. Fyrireikararnir vóna, at nógv fólk vilja taka væl undi við hesum vikuskiftismøtum, tí ynski og bøn er, at Harrin Jesus skal møta okkum og av nýggjum birta eldin í okkara hjarta til at bera gleðiboðskapin út. – Latið okkum hjálpa høvrjum øðrum og bera byrðar hvrr hjá øðrum samstundi sum vit fáa ein góðan sosialin felagsskap, siga teir. Vitjan verður eitt nú. úr Klaksvík, Sandoy og Suðuroy. Oasubrøðurnir syngja leygarkvøldið. Tá talar Árni Kjærbæk og Hjalgrim Davidsen vitnar. Sunnukvøldið talar Regin Drangberg, og tá verður sangvitnisburður frá Ecclesia úr Klaksvík og frá Terja og Honnu úr Kollafirði.

# garð um Putin



Mikhail Gorbatjov

### FAKTA

Mikhail Sergejevitj Gorbatjov er føddur 2. mars 1931. Hann vaks upp í býnum Stavropol, sum liggur har norðuri í Kaukasis. Hann hevur útbúgving sum løgfrøðingur á Universitetinum í Moskva, og fór upp í sovjettiskan politikk í 1955. Frá 1985 til 1991 var hann aðalskrivari í kommunistiska flokkinum og stjórnarleiðari í Sovjetsamveldinum. Í 1990 fekk hann Nobelfriðarheiðurslønina. Í 1996 stillaði hann upp til forsetavalið í Russlandi, men honum eydnaðist bert at fáa 0,5 % av atkvøðunum. Fyri nøkrum vikum stovnaði hann ein nýggjan flokk í Russlandi, sum verður róptur Sosialdemokratiski flokkurin.

*Eg eri fullgreiður yvir, at Putin verður umrøddur sum eitt bølmenni í fleiri londum í Evropa, men veruleikin er, at hann hevur roynst ómetaliga væl sum forseti í Russlandi. Tit gloyma ofta, at Russland er eitt torført land at stjórna og at tað er ómetaliga stríggið at fremja reformar í einum so stórum landi*

*Vit eru í mitt í einari globalari kreppu, og okkum vantar visjónir, hvussu vit koma á rættkjøl. Bert 30 % av heiminum livir í dag á einum virðiligum støði, og tað er sjálvandi ikki nøktandi*

*Eftir mínum tykki stava umhvørvistrupulleikarnir, vit í dag síggja, fyrst og fremst av vantandi umhvørvispolitikkinum í 20. øld. Millum annað er tað ein stórur trupulleiki at veita øllum fólkum í heiminum feskt vatn*

*Tað er nærum blivin ein klassisk søga. Altjóða avtalur, sum lond binda seg til at halda, verða als ikki virdar. Nærum øll lond hava bundið seg til at lata 0,7 % av bruttotjóðarúrtøkuni til menningarhjálp, men í løtuni er tað bara fýra lond, sum halda avtaluna*

iska mafian hevði eisini góðar dagar undir Jeltsin, men leikluturin hjá henni er minkaður undir Putin, heldur fyrrverandi stjórnarleiðarin.

Samstundis eftirlýsti Gorbatjov, at evropearar royna at skilja støðuna í Russlandi betur. Hann vísti á, at landið hevur framvegis langt á mál.

- Evropearar eru rættiliga skjótir at finnast at Russlandi, tí tað eftir teirra tykki gongur ov seint at fremja neyðugu reformarnar. Eftir mínum tykki hava árini við Putin sum stjórnarleiðara verið við til at gera Russland meira demokratiskt. Vit eru bara komin helmingin av leiðini til at gerast eitt demokratiskt og frælst land eftir at hava verið í haftinum av kommunismuni í stórum parti av 1

20. øld. Tí er tað týdningarmikið, at tit hava tol við okkum, fortaldi hann.

### ES og Russland hond í hond

Fleiri eygleiðarar hava seinastu árini spátt, at komandi árini fer Russland – eins og Sovjet undir kalda krígnum - aftur at fáa eina lyklastøðu í heimspolitikki. Metingin er, at stríðið um orkukeldur fer at seta dagsskránna í enn størri mun enn tað ger í dag. Og í tí sambandi hevur Russland við sínum ovurhondsstóru olju- og gasskeldum eitt frálíkt útgangsstøði. Evropa Samveldið hevur í løtuni stóran tørv á bæði olju og gassi úr Russland, og hetta gevur Russlandi sera góð kort á hondina í samráðingum við ES. Evropeiskir leiðarar bera ótta fyri, at Russland fer at gera sær dælt av støðuni og leggja hart trýst á tey evropeisku londini í samráðingum.

Ræðumyndin í Vesturevropa er, at Putin fer at føra ein revolvarapolitikk mótvegis restini av Evropa á orkuøkinum. Hesa ræðumynd kennir Mikhail Gorbatjov ikki aftur. Retoriskt setir hann spurningin, hvør fær nakað burtur úr tí?

- Tað er burtur úr vón og viti at hugsa sær, at Russland fer at trýsta ES við sínari góðu støðu á orkuøkinum. Russland hevur stóran tørv á ES - bæði ES-valuta og ES-forbrúkarum. Tí haldi eg talan er um eina mistonkiliggering, tá hesir tankar vinna frama. Vit eiga at hava skilagóð viðurskifti millum ES og Russland. Uttan mun um vit nakrantíð gerast limir í ES, so síggja vit russarar okkum sum evroperarar, heldur Gorbatjov.

### Global kreppa

Undir fyrilestrinum nam Mikhail Gorbatjov eisini við støðuna í heiminum. Og lat tað vera sagt beinanvegin: Mikhail Gorbatjov er ikki bjartskygdur um gongdina í heiminum í dag. Heldur tvørturímóti.

Vit eru í mitt í einari globalari kreppu, og okkum vantar visjónir, hvussu vit koma á rætt kjøl. Bert 30 % av heiminum livir í dag á einum virðiligum støði, og tað er sjálvandi ikki nøktandi. Helvtin av øllum heimsins borgarum liva fyri ein til tveir dollarar um dagin. Heimurin er eisini ovfólkaður í løtuni. Í byrjanini av 20. øld vóru vit 1,6 milliard í heiminum, men nú eru vit meira 6 milliardir fólk. Hesi tølini siga ikki so lítið, segði Mikhail Gorbatjov

Fyrrverandi stjórnarleiðarin í Sovjetsamveldinum hartaði tey stóru londini í heiminum fyri at gera alt ov lítið fyri at basa fátækradøminum í heiminum.

Tað er nærum blivin ein klassisk søga. Altjóða avtalur, sum lond binda seg til at halda, verða als ikki virdar. Nærum øll lond hava bundið seg til at lata 0,7 % av bruttotjóðarúrtøkuni til menningarhjálp, men í løtuni er tað bara fýra lond, sum halda avtaluna. Tað er snøgt sagt ov vánaligt, greiddi Mikhail Gorbatjov frá.

Undir fyrilestrinum kom Mikhail Gorbatjov við einari inniligari áheitan á vesturheimin um at taka umhvørvið í nógv størri álvara – tí tað er fyrst og fremst vesturheimurin, sum er noyddur at ganga undan.

- Vit hava í løtuni eina grundleggjandi umhvørviskreppu í heiminum. Millum annað er tað ein stórur trupulleiki at veita øllum fólkum í heiminum feskt vatn. Vit hava havt fleiri stórar altjóða stevnur um at loysa trupulleikan við feskum vatni, men einki tykist verða komið burturúr. Eftir mínum tykki stava umhvørvistrupulleikarnir, vit í dag síggja, fyrst og fremst av vantandiumhvørvispolitikkinum í 20. øld, fortaldi hann.

Mikhail Gorbatjov nevndi Kyoto-avtaluna sum ein møguleika fyri at loysa partar av galdandi umhvørvistrupulleikum.Samstundis hartaði hann bæði USA og Russland fyri ikki at hava undirskrivað Kyoto-avtaluna.

- So leingi USA ikki vil binda seg, vil Russland heldur ikki binda seg.

### Fáar loysnir

Hóast Mihhail Gorbatjov nýtti nógva orku í sínum fyrilestri at vísa á, hvørjir trupulleikar eru í heiminum í dag, var hann trekur at koma við nøkrum ítøkiligum loysnum. Hann staðfesti fleiri ferðir, at tað er neyðugt at skifta núverandi skipanir út fyri at bøta um støðuna. Fleiri áhoyrarar høvdu eisini áhuga í at vita nærri, hvussu hann helt hesa loysnir skuldu finnast, men Gorbatjov hevði ilt við at vísa á nakrar ítøkiligar politiskar loysnir.